*Framhald a síðu 2*

var sekstan ára gamli hoyvíkingurin Henry Berg, hann hevði sína heilt egnu tolking av "Come Undone" hjá Robbie Williams. Tó at røddin hjá Henry er serlig, so hevði tað verið gott, um hann sang eitt sindur reinari, hetta krevur meira venjing. Serliga hevði hann trupult við at syngja reint, tá hann leikaði ov illa í.

Seinastur á pallin var nítjan ára gamli Anfinn Danielsen úr Havn. Hann leikaði øðiliga illa í, og rann runt og dansaði til Red Hot Chilli Peppers lagið "Zephyr song". Hóast hann leikaði í var pallframførslan uttan nakað serligt samband við áhoyraran. Hann mest sum dansaði í síni egnu verð. Dansurin legði seg tætt upp at rørslunum hjá sangaranum í RHCP, tó uttan at smelta saman við tónleikinum, og heilt uttan at fanga áskoðaran. Lagið var dekan ov høgt til røddina hjá Anfinni, og tá hann so eisini leikaði í bar av. Røddin orkaði als ikki at raka røttu tónarnar.

Samanumtikið var úrslitið á sangkappingini at Nicolina vann, Evi gjørdist nummar tvey og Hedavík nummar trý, og hetta var uppiborðið.

HOFF STOFF

# Kongalig upphitan



**Punkbólkar valdast, meðan kendasti føroyski punkbólkurin syngur um svøltan av hundum, landminir og skotgravir í sambandi við drotningavitjanina, so fyrireikar yngsti føroyski punkbólkurin Paradox seg til at spæla fyri Fríðrikki og Mary**

HOF-STOF
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Seinnapartin týsdagin høvdu Paradox ljóðroynd til fyrstu kongaligu punkkonsertina í Føroyum nakrantíð. Í sambandi við at Krúnprinsurin og frú vitja Margarinfabrikkina, verður stórt tiltak hildið á parkeringsøkinum yvir av gamla reinsarínum. Har verða millum onnur ungi bólkurin, sum hevur koppa Føroyum við sínum popputta, festliga og óvanliga vælspælda punki.

Hølini í Margarinfabrikkini eru ov lítil til at bera trýstið av teimum nógvu ungu, um allir limirnir á fabrikkini vilja hitta krúnprinsa hjúnini. Men samstundis ber ikki til at útihýsa børnum og ungum frá sínum tilhaldi. Tí verður virksemið flutt út um. Tað skilst á skrivi, sum Margarinfabrikkin hevur sent til foreldur at børnum, sum ganga har. At Parkeringsplássið í nakrar tímar gerst skateboard breyt, har verður eisini hip hop dansur, og so sjálvandi Paradox.

Ljóðroyndin hjá Paradox ljóðaði avbera væl, og krúnprinsurin, sum er stórur tónleikafjeppari, fer at síggja, at føroyskur tónleikur hevur annað at bjóða uppá enn Teit, sum spældi konsert fyri Fríðrikki og Mary í fjør.

